


## Ellisakførini verða flotað flaggdagin

Sekstanda árið á rað skipar Føroya Ellisakfør aftur í ár fyri siðvandu raðkoyringini við ellisakførum flaggdagin. Tað er vorðið til fastan sið, at ellisakførini verða flotað flaggdagin, eins og kappróðrarbátarnir.
Ellisakførini møtast á Shellstøðini við Ringvegin í Havn kl 14 flaggdagin og koyra síðani í "skrúðgongu" oman á Kongabrúnna, har akførini verða sýnd fram til kl 17, tá farið verður í felagshølini yviri við Strond.
Roknað verður við nógvum akførum hesaferð – eitt nú tí at nýggja felagið "Havnar Bilasavn" hevur keypt øll ellisakførini hjá Hans Elmari Poulsen á Vatnsoyrum.

## Javnaðarflokkurin møtir veljarunum í Klaksvík

Undir heitinum "Flokkurin møtir veljarunum" er Javnaðarflokkurin farin undir eitt landsfevnandi átak, har valdu umboð floksins fáa høvi at greiða frá, hvørji úrslit eru rokkin í valskeiðinum, sum nú fer at halla, og har veljarin hevur høvi at siga sína hugsan um politikkin og úrslitini.
Við á fundunum verða ting- og landsstýrisumboð floksins.

# Ongin ræning í ár



*Bæði lomvigin og lundin eru so illa fyri, at tað er neyðugt at avmarka veiðina, sigur Náttúrugripasavnið. Myndin er bókin hjá Arne Nørrevang um bjargasøguna. Peter Alberg Jensen hevur tikið hana av Skúvoyarbjørgunum*

**Náttúrugripasavnið hevur gjørt av ikki at geva loyvi til at draga lunda ella ræna lomvigaregg í ár**

Tað verður hvørki loyvt at draga lunda ella at ræna lomviaregg í ár

Tað hevur Náttúrugripasavnið gjørt av.

Tað er í grundini bæði ólógligt at draga lunda og at ræna lomviaregg, undantøk kunnu gerast, partvís fyri at varðveita mentanina.

Longu, tá ið Sverre Patursson í 1939 skrivaði um lundameingið í Føroyum, gjørdi hann vart við, at dráttur var ein av orsøkunum til, at lundin var minkaður. Lundin, sum verður drigin, er búfuglur, sum júst hevur vorpið, og liggur á reiðri. Tí var hesin veiðiháttur bannaður, tá nýggj fuglaveiðilóg varð lýst í 1954.

Náttúrugripasavnið sigur, at undir serligum umstøðum kann loyvi gevast til at draga lunda, tó bara triðja hvørt ár í sama fuglalandi.

Tað er annars ikki so stórur áhugi fyri at draga lunda longur, men nakrar umsóknir koma á hvørjum ári, serliga úr Mykinesi og Sandoynni, og veiðan hevur ligið um einar 1000 lundar tilsamans á hvørjum ári.

Men tað er ikki í samsvari við nútíðar veiðimentan at veiða búfugl í verpingartíðini, men í umsóknunum verður ofta ført fram, at lundarnir hava grivið so nógv, at vandi er fyri, at alt lundalandið leypur burtur.

Seinastu árini eru sera fáar lundapisur komnar undan, og tí hevur Náttúrugripasavnið gjørt av ikki at loyva drátti í ár.

Tað er eisini ólógligt at ræna lomvigaregg, men undantøk kunnu gevast til at ræna í teimum størstu lomvigabjørgunum fyri at varðveita mentanina.

Mett varð heldur ikki, at ein avmarkað æning skaddi stovnin munandi.

Seinastu árini hevur lomvigin tó verið illa fyri og sera fá egg vóru í fjør og tí hevur Náttúrugripasavnið gjørt av ikki at loyva ræning í ár.

Hendan avgerðin forðar tó ikki fyri, at farið verður í bjørgini at skifta kongar og líknandi, leggur savnið afturat.

# Taka fegin kappingina upp

**Í Tryggingarfelagnum Føroyum taka tey væl ímóti ætlanini at broyta lógina so at kapping fæst á økinum**

KAPPING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í løtuni viðgerð Løgtingið eitt uppskot um at broyta tryggingarlógina.

Ein tann stóra broytingin í hesum verður, at nú skal kapping fáast á økinum.

Higartil hevur tryggingarmarknaðurin verið fullkomiliga afturlatin so at útlendsk tryggingarfeløg eru ikki sloppin at virka í Føroyum og føroysk tryggingarfeløg eru ikki sloppin at tekna tryggingar uttanlands.

Men hetta skal nú broytast so at marknaðurin verður latin upp.

Sostatt skulu útlendsk feløg sleppa at virka í Føroyum og somuleiðis skulu føroysk tryggingarfeløg sleppa at tekna tryggingar uttanlands.

Men hesum stúrir stjórin í Tryggingarfelagnum Føroyum ikki fyri.

- Vit síggja hetta meir sum ein møguleika fyri at økja um okkara virksemi, heldur enn sum eina hóttan um, at útlendskt tryggingarfeløg koma til Føroyar at kappast við okkum, sigur Gunnar í Liða, stjóri í trygg-ingini.

- Vit síggja nýggjar møguleikar í hesum, leggur hann afturat.

Hann sigur, at nú kann Tryggingarfelagið Føroyar eisini tekna tryggingar uttanlands og tað kann geva nýggjar møguleikar at menna felagið.

Og uttanlands eru ymsir møguleikar.

- Ein møguleiki kann vera at tryggja føroysk áhugamál uttanlands. Ein annar møguleiki kann vera at fara í samstarv við eitt útlendskt tryggingarfelag.

- Men talan kann eisini vera um at Tryggingarfelagið Føroyar beinleiðis stovnar deildir ella tryggingarfeløg uttanlands, sigur hann.

Enn vil Gunnar í Liða kortini ikki vera meiri ítøkilig um, hvørjar tankar, teir hava spælt sær við á hesum øki.

# Amnesty í Føroyum fingið nýggjar kreftir

**Á aðalfundi leygardagin, fekk Amnesty International í Føroyum tríggjar nýggjar nevndarlimir**

NEVNDARVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Amnesty Inernational hevur fingið nýggjar kreftir í nevndina. Á aðalfundinum leygardagin , vórðu tríggir, nýggir nevndarlimir valdir.

Men tað vórðu tey fyrireikað upp á, tí longu frammanundan hevði forkvinnan seinastu seks árini, Annika Sølvará, boðað frá, at hon vildi fegin lata onkran annan sleppa framat.

Tað sama hevði Jette Hoydal, sum er næstformanskvinna, boðað frá og haraftur at tók Áki Johansen seg úr nevndini mitt í valskeiðnum tí hann hevði ov nógv at gera.

Teir tríggir nýggju nevndarlimirnir í Amnesty í Føroyum eru Firouz Gaini, Dorte Pedersen og Carl August Arge. Hinir nevndarlimirnir eru Erling Isholm og Katarina Petersen og tey hava verið í nevndini í mong ár. Tiltakslimir í nevndini eru Unn Poulsen og Birita Ludvíksdóttir og tær eru eisini nývaldar.

Av tí at Annika Sølvará hevur tikið seg úr nevndini, er tað eisini greitt, at Amnesty skal hava nýggjan formann ella forkvinnu Men nevndin skipar seg sjálv og ein av fyrstu døgunum fer hon so at velja ein av nevndini til nýggjan formann ella -kvinnu.

- Á aðalfundinum hildu Genefke og maður hennara, Bent Sørensen, stak áhugaverdan fyrilestur um arbeiði við offrum fyri píning, har tey hava gjørt slóðbrótandi arbeiðið, sum hevur vunnið, stóra, altjóða viðurkenning.




*Nevndin í Føroya deildini hjá Amnesty International, er nú hendan, frá vinstru: Firouz Gaini, Unn Poulsen, tiltakslimur, Erling Isholm, Katarina Petersen, Dorte Pedersen og Carl August Arge. Á myndini manglar Birita Ludvíksdóttir, sum er tiltakslimur*